

*Hóast fólkið í Hesti kanska tykist mótfallið um framtíðina, so eru tað kortini ikki øll sum eru tað*

# Tiltak fyri ferðavinnuna

**Hestur:** Hóast bygdin í mangar mátar hevur staðið í stað í menningini, so eru tað kortini ikki øll sum hava mist vónina um at her skal verða liviligt at búgva.

Í seinastu útgávuni av útoyggjablaðnum "Glóðini" verður tikið saman um støðuna kring landið. Her verður m.a. sagt, at í Hesti er eingin fólkavøkstur og at fólk sakna vinnuligt virksemi í bygdini.

Tey sum búgva í bygdini liva framvegis av landbúnaði, útróðri, eins og nøkur ferðast inn á meginøkið at arbeiða.

Hóast hesar døpru veruleikar, so er kortini talan um at fólk hava hug at fara undir ymisk tiltøk, sum kunnu menna ferðavinnuna í oynni. Lítið ítøkiligt verður sagt um hetta, men blaðið slær kortini fast, at hetta kann gerast byrjanin til størri lokalt vinnuvirksemi.

**sb.**





Føroyaprent fer nú at menna marknaðar- og søluarbeiðið, og søkja vit tí eftir søluleiðara. Tú skalt, saman við tilboðsroknarum og virkissamskipara, styrkja tey trý grundleggjandi virðini hjá okkum, sum eru: rættur prísur, góðska og levering til tíðina.

**Vit hugsa okkum, at tú:**

- helst hevur eina viðkomandi útbúgving innan sølu og marknaðarføring
- hevur royndir við B2B sølu
- hevur lætt við at samskifta við viðskiftafólk og starvsfelagar
- dugir at orða teg í talu og á skrift
- hevur lætt við at koma í samband við fólk
- hevur áræði, ert álítandi, nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- at títt fremsta mál er at fáa kundarnar at kenna seg nøgdar

**Ábyrgdarøki**

Sum søluleiðari hevur tú ábyrgd av allari sølu og marknaðarføring, tað verður tín uppgáva at styrka sambandið við viðskiftafólk okkara, eins og tú skapar samband við nýggjar kundar.

Fram um alt skalt tú virka undir tí grundleggjandi treytini: Eitt orð er eitt orð.

**Arbeiðsviðurskifti**

Á Føroyaprent bjóða vit tær eitt mennandi umhvørvi. Tú ført eitt avbjóðandi starv, sum er at menna størsta grafiska virkið í Føroyum. Málið er sjálvandi ein sunnur øktur umsetningur. Tú fert at virka undir stjóranum og í okkara leiðslubólki

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring til Jon Hestoy, stjóra, á telefon 59 45 55.

**Umsóknarfreist 22. januar 2006**

Skrivlig umsókn við CV verður at senda til:
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Postsmoga 3118 - 110 Tórshavn

Hoyviksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · hestoy@foroyaprent.fo

Føroyaprent


## Barnavinur vitjar samkomur

**Zarepta:** Í hesum døgum vitjar trúboðarin Sebastian Edelmann í Føroyum.

Sebastian hevur arbeitt í 22 ár við Child Evangelism Fellowship (CEF), ið er ein felagskapur, ið serliga arbeiðir ímillum børn. Hann hevur arbeitt í eystur Týsklandi, Rumenia, Slovakia og Slovenia.

Í løtuni er Sebastian leiðari hjá CEF í Ukraina og Belarus, har meir enn 40 fulltíðararbeiðarar virka. Hesir náa meir enn 50.000 børnum árliga. Í Týsklandi, har Sebastian hevur búð seinastu árini, hevur hann eisini verið við at stovna nýggja samkomu, sum í dag hevur uml. 50 limir.

Sebastian vitjaði fyrstu ferð í Føroyum í 2004, og hevði hendan vitjanin serligt tilknýti til leguarbeiðið í Zarepta við ynski um ráðgeving og stuðul úr Føroyum. CEF arbeiðir við legum fyri børn í Ukraina, og visti onkur í leiðsluni har um leguarbeiðið í Føroyum.

Á hvørjum ári fer fram innsavning millum leguluttakararnar í Zarepta til eina serliga verkætlan, ið nevnist "Hini". Hendan innsavning verður latin til ymisk kristilig arbeiði millum børn og ung uttanlands.

Zarepta hevur tvey tey seinastu árini latið tað, ið savnað verður inn til hesa serstøku verkætlanina hjá CEF í vestara parti av Ukraina.

Á ferðini í Føroyum fara Sebastian Edelmann og John í Skemmuni at vitja nakrar samkomur kring landið. Í annaðkvøld vitjar hann samkomuna á Tvøroyri, og síðani verður vitjað í Klaksvík, Gøtu, Eiði og í Runavík.

**sb.**




*Á hvørjum ári savna leguluttakarar á Zarepta (myndin) inn til barnaarbeiði uttanlands. Nú er ein umboðsmaður fyri ein slíkan felagsskap á vitjan í Føroyum*

## Arbeiðsloysið lítið broytt

Talið av fulltíðararbeiðsleysum var í november 2005 gjørt upp til 1.027 fólk. Hetta eru á leið tað sama sum fyri einum ári síðani og 28 fleiri enn mánaðin fyri.

Arbeiðsloysið minkaði frá februar til juni, men hevur síðani tá verið rættiliga støðugt við umleið 1.000 fulltíðararbeiðsleysum, seinastu 4 mánaðirnar tó við einum lítlum vøkstri.

Arbeiðsloysið hevur alt tað seinasta árið, uttan í januar og februar verið minni enn 4% av arbeiðsfjøldini, og hetta er lágt samanborið við okkara grannalond.

**sb.**

## Serlig átøk at fríðka bygdirnar

**Sørvágur:** Nú skal gerast nakað ítøkiligt fyri at fríðka um tær vestastu bygdirnar í Føroyum.

Á fíggjarlógini fyri í ár hevur bygdaráðið í Sørvágs kommunu samtykt at játta pening til fríðkan av teim fýra bygdunum í kommununi – Sørvági, Bø, Gásadali og í Mykinesi.

– Hetta er sjálvandi nakað, sum aðrar kommunur í royndu og veru gera hvørt einasta ár.

– Men tað er sera jaligt, at bygdaráðið sær møguleikan í at gera serlig átøk hetta komandi árið, sigur borgarstjórin, Jákup Suni Lauritsen.

Til tess at røkka hesum máli hevur bygdaráðið somuleiðis samtykt at setast skal ein laðingarmaður til hetta.

**sb.**